# Føroyskir sjónleikarar sera góð ummæli í Danmark

**Sjónleikurin Don Juan fra Tranhuset, sum í síðstu viku varð frumframførdur á Odense leikhúsi hevur fingið sera góð ummæli í donskum bløðum**

SJÓNLEIKUR
*Jan Muller*

Tað eru føroysku sjónleikararnir Marita Dalsgaard og Gunnvá Zachariassen, ið saman við tí donsku Christine Albeck hava gjørt stuttsøguna, Don Juan fra Tranhuset, hjá William Heinesen til sjónleik. Marita og Christina eru útbúgvnar á sjónleikaraskúlanum í Odense, meðan Gunnvá er útbúgvin á Statens teaterskole í Keypmannahavn. Rektarin á sjónleikaraskúlanum við almenna leikhúsið í Odense, Lane Lind, hevur verið ráðgevi hjá teimum trimum ungu leikarunum, og leikurin sjálvur verður framførdur á Raffinaderiet, ein lítil leikpallur, ið er partur av Odense Teater. Danska tónaskaldið Nicolas Kongo hevur gjørt tónleikin til leikin um tann unga og loyndarfulla mannin av Malta, ið ein dag í 1893 skipbrotin kemur á land í Tórshavn.

Tær trýggjar Marita, Gunnvá og Christine framføra leikin á palli. Donsk bløð hava sum nevnt bert rósandi orð um leikin og framførsluna sum heild. Ikki ein atfinning hevur verið at sæð í bløðunum, ið annars hava sýnt leikinum stóran ans.

Leikurin fær soleiðis heilar fýra av seks møguligum stjørnum frá Ekstrabladet, ið m.a. skrivar:

*”De tre unge skuespillere fortæller Heinesens saftige gyser i et flot gennemarbejdet show..” Børsen kallar leikin ”Vellykket verdenspremiere på William Heinesens beretning om kvindebedåreren Don Juan”. Børsen sigur víðari: ” Det er ikke blot kvinderne i teaterstykket ”Don Juan fra Tranhuset”, som forføres: Publikum bliver det også. For med behændighed, som var de tre kvindelige skuespillere i familie med de tre hekse fra Shakespeares Macbeth, fanger, fængsler og forfører de os. Og Børsen heldur fram: ” Don Juan fra Tranhuset, lagt i hænderne på Christine Albeck, Marita Dalsgaard og Gunnvá Zachariassen, er således en oplevelse, De bør unde Dem selv. For både tekst og skuespilpræstationer syder af vellyst og forførelse, og hvem har ikke lyst til at blive forført? Der er i hvert fald god grund til at blive det med denne teateropførelse”*

Jyllandsposten er eisini sera rósandi í sínum ummæli av leikinum og sigur m.a.:

*”Don Juan fra Tranhuset” er en dygtigt lavet og dygtigt udført lille forestilling på Raffinaderiet i Odense” . .. Den er ikke direkte dramatiseret. Men der er skabt andre billeder. Det betyder, at den, der ved læsning eller lytning normalt ser billeder for sig, får to lag billeder samtidig. Lad os kalde det billedkontrapunkt.*

Í Fyns Stiftstidende, ið eisini er sera positivt í sínum ummæli, endar ummælararin Jørgen Aagaard ummæli sítt soleiðis:

*”Dramaet åbenbares for os i klassisk stil, hvor Marita Dalsgaard, Christine Albeck og Gunnvá Zach-ariassen med én og dog forskellig stemme ses og høres i rollerne som fortælleren, kommentatoren, sladdertaskerne og galleriet af erotisk oprørte kvinder. Det sker i en dogmeagtig scenografi af en forhøjning og et klaver draperet med luftige stoffer, hvor lyssætningen er den afgørende medspiller sammen med Nicolas Kingo på klaveret. Men ordene, bevægelserne og kropsudtrykkene står tilbage som det essentielle i dette rendyrkede drama, som giver de tre skue-spillere mulighed for at afsløre alle talenterne. For at spille på hele klaviaturet af følelsesmæssige udtryk.*

*Og det gør de forbilledligt, så hverken øjne eller ører får hvile i de intense 70 minutter.”*

Eisini stóra blaðið Politikken, hevur givið leikinum ser góð ummæli.


EKSTRA BLADET

VÅDE DRØMME

Fortærende

forførende Don J

...ndag den 17 december 2000

Færøsk

teaterfortælling

Don Juan fra Tranhuset” er en dygtigt lavet og dygtigt udført lille forestilling på Raffinaderiet i Odense

*Kut ú rdonskum bløðum*


*Føroysku sjónleikararnir, Marita Dalsgaard og Gunnvá Zachariassenn, ið saman við tí donsku Christine Albeck hava gjørt stuttsøguna, Don Juan fra Tranhuset, hjá William Heinesen til sjónleik*

Ólavur Hátún:

# – Dygdarverk av Kára Bæk

**Seinasta leygardag var konsert í Kvívíkar kirkju, har Vestmanna sangkór framførdi kantatu eftir Kára Bæk. Afturat kórsanginum vóru messingblásarar og urguspæl. Ólavur Hátún metir, at kantatan og konsertin sum heild eydnaðist sera væl**

Kantata
*Stefan í Skorini*


*Kári Bæk hevur komponera eina kantatu, sum varð frumframførd í Kvívíkar kirkju leygardagin*

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein kvívíkingur sjálvur komponerarar eina kantatu, men hóast hetta so var kirkjan ikki full leygardagin, tá frumframførsla var á skránni í Kvívíkar kirkju. Hetta var kanska eitt vónbrot, tí onkur hevði væntað, at fleiri fóru at leggja leiðina í kirkjuna tann dagin.

Tað var Vestmanna sangkór, sum bæði hevur menn og kvinnur, ið framførdi kantatuna saman við messingblásarum og urguspælara.

– Tey komu bara heilt væl frá sínum avriki, og tað varð væl frágingið. Kantatan er eitt dygdarverk, metir Ólavur Hátún.

Tað er eingin ivi um, at Vestmanna sangkór er eitt av okkara bestu her á landi, og teirra partur varð væl úr hondum greiddur. Tey hava sungið saman sera leingi, og tað er avgjørt ein styrki hjá kórinum.

Av tí at hetta var frumframførslan, so er altíð okkurt, sum kundi verið eitt vet betri. Tað var kanska eitt sindur óheppið, at fjarstøðan millum blásararnar og kórið var so stór. Tað var soleiðis, at blásararnir sótu uppi á loftinum, og kórið var niðriundir. Hetta merkti konsertina eitt sindur.

Kári Bæk hevur gjørt kantatuna eftir einum bíbliuteksti í evangeliunum.

Tað eru Vestmanna kommuna og Kvívíkar sókn, sum hava tikið stig til hesa kantatu.

# Jólablaðið 2000



# Tey forpliktandi jólini



JÓLINI 2000
*Jústinus Leivsson Eidesgaard, tíðindaleiðari*

Kendi danski heimsspekingurin, filosoffurin Søren Kirkegaard, sigur um Jesu deyða og uppreisn, at hendan hending er so ørandi, svøk, garvill og óskiljandi, at tú mást trúgva henni. Her er slett ikki talan um fornuft, soleiðis sum vit menniskju skilja hana. Men tú mást trúgva, tí hendan hending er heilt eksistensiel ella lívsavgerandi fyri teg. Hon er tann opna hurðin, at lívið heldur fram eftir deyðan, at lívið her á fold ikki bert er ein avmarkað ævið. Trýr tú, so gevur Jesu deyði vissu fyri, at vit í hesum lívi eru á eini ferð, har gott er í væntu, longur fram vit koma á leiðina, ógvuliga gott og tað gerst betri og betri. Jólini, at Gud lat seg føða sum menniskja er eins ólogisk, ófornuftig og deyðin á krossinum 33 ár seinni og uppreisnin. Føðingin er byrjanin til eina heild, sum gevur okkum dirvi til at trúgva, at lívið kann vera gott, hóast sterkan mótgang og at vónin um eitt uppaftur betri lív eftir hetta uggar hjá okkum her og nú.

Men eins og hjá Søren Kirkegaard um Jesu deyða, so skal eins nógv trúgv til at trúgva, at Gud lat seg føða sum menniskja. Og tað er eins nógv eksistensielt, lívsavgerandi at trúgva á Jesu føðing, sum Jesu deyða. Uttan føðing, ongin deyði.

Jólini eru yvir okkum og gleðiboðskapurin við. “Friður á jørð og í menniskjum góður tokki.” Vit eru so góð á jólum, vit royna og innast inni vilja vit vera góð. Tey flestu kenna friðin, sum eisini valdaði á markunum fyri 2000 árum síðan. Jesu føðingardagur fer ikki í gloymskuna, hann fer ikki bara framvið, hann kelar okkum við sínum kærleika ár undan ári. Vit føðast, gerast eldri og vóna um ævinleikan og føðingardagsbarnið er garanturin fyri hesi vón.

Jólini eru so kensluborin. Tey mugu ikki miseydnast hugsa tey flestu av okkum. Øll eiga at vera góð á Jólum. Øll eiga at vera glað á Jólum.

Gleðiboðskapurin kom til foldar fyri 2000 árum síðan og hann endurføðist hvønn einasta dag og serliga á jólum.

Men jólini eru so forpliktandi og ivasamt er, um føðingardagsbarnið vil, at vit skulu stressa okkum soleiðis sum vit gera hvørji jól. Kanska vit bara skuldu tikið tey akkurát sum tey koma. Geva okkara børnum eini gleðifest, men ikki stressa so nógv, at vit gloyma og missa okkum sjálvi, tá er vandi á ferð. Spyrja okkum, hvar eru vit í øllum stásinum. Hava vit tað gott, tá jólini eru so kravmikil, sum tey eru endaði við, nú jólastásið er vorðið ein partur av gerandisdegnum, longu áðrenn heystið er hálvrunnið.

Friður á jørð og í menniskjum góður tokki. Soleiðis ljóðaði boðskapurin frá einglunum á markini. Og jólini eru so kensluborin. Tú skal vera so sterkur, alt skal rigga so væl hjá tær, skulu jólini kennast sum stóra gleðishøgtíðin, friðarhøgtíðin.

Fyri mong í samfelagnum er jólin ein ring tíð. Ja, hon er kanska tann ringasta árinum fyri summi. Á jólum verður tú so konfronteraður. Tá veit tann, sum ikki hevur tað so gott, at hini sum hava tað gott, tey hugna sær rættuliga.

Tann skildi hugsar mangan um tað heilu familjuna, sum nú er syndrað. Um børnini, sum ikki eru saman, ella sum bara eru hjá tí eina partinum. Tey óeydnusomu hjúnini hugsa um tey eydnusomu og alt er grønari hjá grannanum. Tann sjúki verður mintur á hvussu gott tað var fyrr, tá heilsan var sterk.

Drykkjumaðurin, sum hevur mist alt, letir mangt tárið falla á jólum, hann hugsar um alt sum hann kundi átt, men sum nú er farið, ella sum sambond, sum eru kvett, tí tey ikki bera longur til orsakað av hans vána lívi, tí lív hans er so háttað, ófýsið og óforeiniligt við eina glaða familju.

Tey sum ikki klára seg í familjuni, fyri teimum eru jólini mangan svárasta tíð á árinum. Lat tí okkara tankar vera hjá teimum og lat okkum senda eina stilla bøn til føðingardagsbarnið um eymliga at hyggja eftir teimum.

Vit byrjaðu vit at siga, at hendingin á jólum og hendingin páskadag, tær grundleggjandi hendingarnar í okkara trúgv, tær eru so fantastiskar, at logikkur og vanlig fornuft fær okkum ikki til at skilja tær. Vit mugu trúgva.

Ein av høvuðssetningunum hjá Jesus var trúgv. “Trúgv tín hevur frelst teg.”

Dámar einum ikki orðið frelst, so kunnu vit í staðin siga, at trúgvin hevur loyst okkum. Jesus sigur uggandi við okkum í Jóhannis 3:16 “Ein og hvør sum trýr skal ikki glatast, men hava ævigt lív.”

Jesus tosar eins og Kierkegaard ikki um fornuft. Hjá honum er ein klárur skilnaður eisini millum Guð og menniskjuna. Hann tosað um, at Guð er í okkum í tann mun tað er neyðugt at halda okkum á røttu leiðina. Men Guð er eisini almáttugur og hevði magt í hendi, sum menniskjan ongantíð fær í sín lut. Tí skulu vit heldur ikki skilja alt, sum hevur við Guð at gera. Vit skulu trúgva, at Gud er góður, og at tað hann fekkst við er til tað góða fyri okkum. Men vit skulu ikki skilja Gud. Vit skulu trúgva at alt Gud vil er til okkara besta og at vit einaferð fara at síggja meiningina við tí, hóast vit einki skilja í løtuni.

Jesus talar eisini um, at vit fáa ikki at síggja alt beinan vegin. Vit skulu trúgva, vit skulu trúgva sum eitt barn. So hvørt sum vit eru búgvin, so sleppa vit at síggja meira, men vit sleppa ongantíð at síggja alt. Trúgvin í okkara kristna lívið verður ongantíð avloyst vitan, so sterkari, at hon kann erstatta trúnna.